LM-116/2020

Tórshavn 21. januar 2021

Mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5 - 7
100 Tórshavn

UWC Føroyar takkar við hesum fyri uppskotið til lógarbroyting í løgtingslóg um lestrarstuðul, sum Mentamálaráðið hevur sent UWC Føroyum til ummælis.

Niðanfyri eru tær viðmerkingar, sum UWC Føroyar hevur til uppskotið.

Viðv. punkt 3, § 6 b, Stk 1
Mælt verður til, at orðalagið í Stk. 1 *„Studni kann veita skúlagjaldssudning"* verður broyt til *„Studni veitir skúlagjaldsstuðul"*. Við hesi orðing verður tað greiðari ásett, at Studni ikki bert kann, men skal veita studning til skúlagjaldið.

Viðv. punkt 3, § 6 b, Stk. 3
Mælt verður til, at alt Stk. 3 verður orðað soleiðis: *„Føroyska nevndin fyri United World College, UWC Føroyar, velur ímillum umsøkjarar á hvørjum ári ein næming, sum verður mettur at vera skikkaður."*

Viðmerkjast kann, at UWC høvuðsskrivstovan í London sendir øllum UWC nevndum leiðreglur fyri, hvussu upptøkusamrøðurnar eiga at fara fram og um innihaldið av samrøðunum. Hetta fyri at tryggja, at upptøkan so væl sum gjørligt verður framd sambært sama leisti í øllum londum.

UWC Føroyar fer at enda at takka fyri ta vælvild, sum Mentamálaráðið hevur sýnt hesum serliga norðurlendska útbúgvingartiltaki, sum fer fram á United World College í Noregi, og sum Føroyar hava verið virkin partur av, síðani skúlin varð stovnaður í 1995 undir vernd av hennara hátign Sonju, drottning av Noregi.

Vinarliga / Best regards

UWC Føroyar
Claus Reistrup, Chair
Egholmstrød 7
FO - 100 Tórshavn
Færøerne / Faroe Islands
Tel: +298 555037
E-mail: claus.reistrup@icloud.com